Lestrarráðsfundur á SSD 13.06.2019

*Møtt eru:*
*Árni Jóhan Petersen, formaður*
*Ingmar*
*Hans J.*
*Firouz*
*Bárður*
*Sigrid Joensen, skrivari (feriu)*

*Fundarskrá:*

1. *3 x undangóðkenningar N:N:*
2. *3 x skeiðslýsingar at broyta (Erika)*
3. *Tilfeingisbúskapur (smábroyting – frá fyrimuni til treyt)*

4. *Námsskipan í lóg*
5. *Familju- og arvarættur*
6. *Grundskeið í lóg*
7. *Avtalurættur*
8. *Endurgjaldsrættur*
9. *Fyrisitingarlóg*

*Fundarfrásøgn*

- **N.N. lesur Masterlæru**
  - Tríggjar undangóðkenningar á Københavns Universitet. Alt er ok treytað av, at skjalprógv koma uppá, at skeiðini eru staðin.
  - Skeiðini er (37,5 ECTS íalt):
  - **Public Administration and Management (15 ECTS)**
    - ASTK18007U (id hjá KU)
  - **Political Behavior (15 ECTS)**
    - ASTK18009U (id hjá KU)
  - **European Foreign Policy and EU as an International Actor (7.5 ECTS)**
    - ASTK18240U (id hjá KU)
  - Skeiðini eru ístaðin fyri 2. semestur Masterlæra í Politikki og Umsiting
  - Árni sendir ætlanarloyvi (authorisation of planned modules). Hetta er sent til útbúgvingarleiðara og akademiska skrivara.

- **3 x skeiðslýsingar at broyta (Erika)**
  - Broytt so at evnið gjøgnum allar skeiðslýsingarnar er vælferð.
    - Skeiðslýsingar: Søga 2164.18; Sosialvísindi og samfelagsplanlegging 2165.18; og Politikkur og umsiting 2163.18
  - Nýtt: Grein (paper) max 10 síður og framløga telja 50% av próvtalinum.

        - Framløgan er, at tey eisini undirvísa fyri hvørjum øðrum: søgu- fyri politikklesandi o.s.fr.
    - Frammanundan var bara ein endalig uppgáva. Nú telur uppgávan 50%.
    - Ráðið talar: 1) Verða grein og framløga ikki ov nógv tikið saman við øllum hinum, ið tey lesandi hava fyri somu hálvuna? 2) Er innihaldið nóg greinandi? 3) Hvussu langt hugsast tíðarbilið til seinnu uppgávuna at vera?
    - Árni spyr Eriku: 1) Hví varð próvtøkuháttur broyttur? Vælferð sum evni rættvísger ikki at broyta próvtøkuhátt. 2) Hvussu velja tey lesandi spurning til uppgávuna við endan á skeiðnum?
    - Málsligt: Ingmar sendir uppskot um rættingar.
    - Árni hevur tosað við Eriku, útbúgvingarleiðara, og hevur fingið nøktandi svar uppá ivamálini, sum ráðið ynskti at frætta nærri um.
        - Svar frá Eriku: Eitt skeið endar, áðrenn hetta skeiðið byrjar og eitt skeið strekkir seg út til januar mánað. Ynski hevur verið frá lesandi at fleiri lesandi eru samlaði frá teimum trimum linjunum (søga, politikk og umsiting OG sosialvísindi og samfelagsplanlegging) og við at hava fleiri felagstímar, so verður hetta ynski møtt. Orsøkin til broyting í próvtøkuhátti er grundað á, at sjálvstøðugt arbeiði tíðliga í skeiðinum við einum ítøkjuligum evni (vælferð) innanfyri ymisku fakøkini á teimum trimum linjunum skal styrkja innlæring og sjálvstøðugar førleikar, sum masterlæran leggur upp til.
        - Spurningarnir, sum lesandi velja til seinnu próvtøkuna, eru út frá áhuga og tískil IKKI valdir tilvildarligt (blint).
        - Tíðarbilið til seinnu uppgávuna?????
    - Broytingar góðkendar.

- **Tilfeingisbúskapur**
    - Nýtt: Treyt at hava staðið Mikro 1 og 2, áður bara viðmælt.
    - Hvussu við einum, sum hevur fylgt skeiðnum, men stóð ikki við hálvulok? Kann hugsast, at undantøk eiga at verða givin? Eigur tað tá at standa sum fortreyt, t.d.: Undirvísingarleiðari kann gera undantak.
        - Útbúgvingarleiðari: ynski er at halda fast í orðingini, at Mikro 1 og Mikro 2 skulu vera staðin, men um onkur er í gongd við Mikro 2, so vil støða verða tikin í einstøku førunum, um lesandi kann byrja uppá skeiðið í Tilfeingisbúskapi. Tó er Mikro 1 eitt heilt ár framanundan og skal verða staðið, áðrenn skeiðið byrjar.
    - Próvtøka: Longd á skrivligari próvtøku?
        - Útbúgvingarleiðari: hon er 3 ella 4 tímar, og hann hevur fingið at vita, hann skal lata vera við at áseta tíð, um hetta ikki er heilt sikkurt. Hetta kann broytast, men t.d. í ár er talan um 3. tímar.
        - Mín meting er, at hetta kann standa uttan tíðaráseting, tí skrivlig próvtøka merkir (her) sit-in exam ella tíðar/staðbundin próvtøka. Kanska vit eiga at finna eina orðing/orð, sum kann dekka hendan týdningin (a la sit-in exam)?
    - Broytingar góðkendar

- **Námsskipan í lóg**

- Á enskum, tí tað var høgligt: høvundur úr Íslandi og verður sent til Danmarkar Niður, tá enskt er lættast.
- Verður sent til Danmarkar til kunningar.
- Verður týtt sum skjótast.

- Fyrivarni á síðu 4: tá málið er avgreitt, ber til at strika.

- Námskipanin varð viðgjørd í LR og viðmerkingar til broytingar vórðu diskuteraðar. Neyðugu broytingar eru førdar inn í skjalið. Broytingar eru at finna í skjali við track changes, sum Árni hevur móttikið frá Bárði (13. juni 2019).

- Góðkent treytað av, at tað verður føroyskað.

- **Nota**: Útbúgvingarleiðarar, sum hava námskipanir til viðgerar í LR, skulu vera við í viðgerðini, tí hetta lættir um dialogin og kjak, sum standast burtur úr gjøgnumgongdini. Hetta forðar eisini fyri, at møguligar misskiljingar koma í samskiftinum millum LR/LR-formanni og avvarandi útbúgvingarleiðara.

Skeiðslýsingar (bachelor í lóg):

***NÝGGJAR***:
- *Familju- og arvarættur*
  a. *Skeiðslýsing góðkend treytað av tillaging í samband við viðmerkingar frá LR*
- *Grundskeið í lóg*
  a. *Skeiðslýsing góðkend treytað av tillaging samband við viðmerkingar frá LR*
- *Avtalurættur*
  a. *Skeiðslýsing góðkend treytað av tillaging í samband við viðmerkingar frá LR*

***Broytingar av góðkendum skeiðslýsingum (frá MA til BA)***
- *Endurgjaldsrættur*
  a. *Broytingar góðkendar treytaðar av tillaging í samband við viðmerkingar frá LR*
- *Fyrisitingarlóg*
  a. *Broytingar góðkendar treytaðar av tillaging í samband við viðmerkingar frá LR*

***Endi***